# Hvannasunds Kommuna rópar varskó

**Um landsstýrismaðurin við vinnumálum ikki visti um viðurskiftini frammanundan, so kennir hann tey í hvussu er nú. Hvannasunds Kommuna hevur nevniliga verið á fundi í Vinnumálaráðnum fyri at upplýsa landsstýrismannin um hættisligu og lemjandi umstøðurnar í tunlunum á Borðoynni**



*Beint áðrenn farið verður í tunnilin, noyðist trailaraførarin úr bilinum at sleppa luftini úr fjarðunum – fyri at lække bilin, so nógv sum yvirhøvur gjørligt*

*Mynd: Bárður Lydersen*



*Hvør túrur gjøgnum tunnilin er ein marra hjá bilførarum á stóru bilunum, sum fleiri ferðir um dagin noyðast gjøgnum trongu holini. Teir kenna hvønn kneysa undir loftinum, men eitt lítið óhapp kann gera, at bilurin stendur fastur inni í tunlinum*

*Mynd: Bárður Lydersen*

VEGAKERVI
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Hvønn einasta dag noyðast tey, ið búgva norðanfyri tunlarnar á Borðoynni, at senda sítt dýrasta tilfeingi, børnini, gjøgnum tveir vandafullar tunlar.

Tað eru næmingarnir í framhaldsdeildini, ið hvønn skúladag fara til Klaksvíkar og norðuraftur við bussi.

Fyri ikki so langari tíð síðani kom eldur í bussin. Men tíbetur var hann ikki staddur í tunlunum, sum eru deyðsfellur.

– Vit orka ikki at hugsa um, hvat hevði hent, um bussurin var staddur í tunlinum við 50 børnum, sigur borgarstjórin í Hvannasundi, Júst Poulsen.

Hann sigur víðari, at kommunan hevur eitt lítið sløkkilið, men teimum vitandi er einki sløkkilið millum tunlarnar, og inni í tunlunum er eingin trygdarútgerð yvirhøvur.

Yvirlit hjá Landsverksfrøðinginum yvir ferðsluóhapp vísa, at flestu ferðsluóhapp á landsvegunum í Norðoyggjum henda á vegastrekkinum við tunlarnar.

### Tunlarnir einasta farleið

Herfyri bóðu umboð fyri Hvannasund Kommunu landsstýrismannin um fund, har tey greiddu frá umstøðunum í samband við vegakervið, serstakliga við atliti til Norðoyatunnilin.

Tey vístu á, at tá undirsjóartunnilin verður tikin í brúk, fer ferðslan norðureftir nattúrliga at vaksa.

Norðanfyri tunlarnar búgva um 1000 fólk ella áleið 20 prosent av fólkinum í Norðoyggjum.

Høvuðsvinnan er útróður. Í økinum liggja tvey flakavirki. Tríggjar av seks sjógvalistøðum í Norðoyggjum liggja har, umframt tríggjar av fýra smoltstøðum á landi.

Allur fiskur verður koyrdur til Klaksvíkar við stórum lastbilum og trailarum, fyri síðani at verða koyrdur norðuraftur til virkini. Tá fiskurin er hagreiddur, verður hann førdur aftur til Klaksvíkar við bili.

Nærum alt fóður til alistøðirnar verður koyrt við stórum trailarum og tangabilum.

Størsti parturin av mjólkarframleiðsluni í Norðoyggjum er í økinum norðanfyri tunlarnar.

Tað er sjálvsagt, at vinnuvirkini krevja nógva tænastu. Flestu tænastustovnarnir eru í Klaksvík, og elvir hetta eisini til nógva ferðslu gjøgnum tunlarnar.

Við øllum hesum í huga varð heitt á landsstýrismannin um skjótast at bera so í bandi, at nýggjur tunnil ella tunlar verða gjørdir til bygdirnar norðanfyri.

# Jóna Rasmussen í Oynni

**Listakvinnan Jóna Rasmusen lat sunnudagin upp framsýning í Gallarí Oynni á Tvøroyri. Grafikkur og málningar hanga uppi og sjálv metir Jóna, at litríku málningarnir viga mótvegis grafikkinum, sum er í svørtum og hvítum**



*Jóna Rasmussen sýnir fram í Gallarí Oynni í hesum døgum*

*Mynd: D. Olsen*



*Lokal listafólk eru eisini við og vatlitir og keramikk er at síggja*

*Mynd: D. Olsen*

LIST
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Gallarí Oyggin á Tvøroyri hevur í heyst havt nógv nøvn á skránni og í desember er tað listakvinnan Jóna Rasmussen, sum sýnir fram.

Jóna er kanska mest kend fyri síni grafisku verk, men hon málar eisini og hevur gjørt tað í mong ár.

– Eg havi málað síðani eg var eini 14 ár. At eg so fór at taka lut, tá møguleiki var at læra seg grafikk og at eg helt fram, hevur helst gjørt, at eg eri blivin sjónligari, sigur Jóna Rasmussen.

Litríku málningarnir viga mótvegis svørtu og hvítu grafikkverkunum, metir listakvinnan.

Onkur av málningunum er sera bláur og onkur hevur nevnt hetta fyri Jónu, sum tók hetta til sín, men tó helt, at málningurin var sum hann átti.

Og mong av listaverkunum hava dám av sjógvi og sjólívi og tað metir listakvinnan er náttúrligt. Sjálv hevur hon sjólívið nær í gerandisdegnum og føroyingar síggja sjógv og harvið blátt nærum hvar teir so venda sær.

Sjógvur og sjólív seta dám á og annars eru tað náttúrulýsingar. At sinnislýsingar – kanska í samband við sjólív – eisini fáa rúm sæst á verkheitum sum t.d. Fráferð og Longsul.

### Onnur við

Onnur listafólk eru eisini við, nú Jóna sýnir fram. Hetta eru listafólk úr Suðuroynni, sum hava nøkur verk við á sýningini.

Hans Jørgen Remmer er í Suðuroynni kendur fyri sín dugnaskap og hann hevur vatnlitsmyndir við og Michael Thomsen úr Hvalba hevur framúr vakra keramikklist við. Palle Julsgart, ið rekur Gallarí Oyggin, sýnir eisini fram nakrar av nýggjaru málningum sínum.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Hárfríðkarar fingið prógv á Tekniska Skúla



*Hárfríðkararnir saman við modellunum á Tekniska Skúla í Havn til próvtøkuna fríggjadagin*

**Fríggjadagin 28. november fingu 12 hárfríðkarar prógv á Tekniska Skúla í Havn, tey eru:**

Malan Danielsen, Tórshavn, læruplláss: Salong Sól & Klipp, Tórshavn, Jógvan Hansen, Klaksvík, læruplláss: Sp/f Vera Klipt, Klaksvík, Gurli Isaksen, Vestmanna, læruplláss: Salong Finngerð, Vestmanna, Marian Klein Ivansdóttir, Vestmanna, læruplláss: Salong Tóta, Tórshavn, Beinta Holm Jacobsen, Tórshavn, læruplláss: Salong Olevina, Hoyvík, Sólrun E.M. Jacobsen, Lopra, læruplláss: Fa Klippistovan, Tórshavn, Jacoba Jensen, Vestmanna, læruplláss: Kvilt Hár-fríðkan, Tórshavn, Anja Joensen, Vágur, Salong Elinborg Vágur, Elisabet Johannesen, Keypmannahavn, læruplláss: Jørgen Ludvigsen, Keypmannahavn, Dagny Kristiansen, Fuglafjørður, Salong Viviann, Tórshavn, Erika Nielsen, Tórshavn, læruplláss: Hjá Ásu, Tórshavn, Barbara Steinkross, Tvøroyri, læruplláss: Salong Hárrøktan, Tvøroyri.

# Edith Mørkøre í Smiðjuni í Lítluvík



Edith Mørkøre hevur framsýning í Smiðjuni í Lítluvík í Havn í døgunum frá 4. til 8. desember.

Opið verður frá kl. 15.00 til kl. 19.00 allar dagarnar.

Á framsýningini eru umleið 30 málningar - teir flestu acryl.

Framsýningin er í trimum pørtum.

Ein partur er um hugnalig støð í Havnini. Annar partur er bíbilskur boðskapur inspireraður úr sangum.

Á loftinum í Smiðjuni eru køks- og blómumyndir.

Edith hevur áður verið við á Norðoyarstevnuframsýning og á framsýningum hjá Lions í Havn og í Esturoynni.

Í desember í fjør hevði Edith eina framsýning í Smiðjuni. Hon var væl vitjað, og hetta gav henni hug til at sýna fram aftur í ár

# 25 ára starvsdagur á Fiskirannsóknarstovuni



Mánadagin 1. desember hevur Unnur Patursson í Tórshavn arbeitt í 25 ár á Fiskirannsóknarstovuni.

Arbeiðsøki hjá Unnur hevur øll árini verið at halda skil á sýnum og nytrum savnaði frá landingum og skipum. Eisini hevur hon út frá nytrunum sett aldur á einstøku fiskarnar.

Eyðkenni fyri Unnur er ordan og skil og hon hevur øll árini røkt arbeiðið fyrimyndarliga.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at okkara kæra kona, mamma og omma

**Ann Gunhild Marr Poulsen**

Hoyvík

andaðist á Landssjúkrahúsinum leygarnáttina 29. november, 69 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju mikudagin kl. 13.00.

**Robert, Annika, Beinta og Andras v/ familjum**

Tey, ið ætla at lata blómur ella kransar, kunnu í staðin lata eina peningagávu til Føroya Felag móti Krabbameini.

## Dagurin

**2. desember. Bibiana,** (deyð umleið 1367). Dóttir ein keisarligan embætismann Flavianus. Tá ið tað kom upp, at dóttirin var kristin, vórðu øll í húsinum tikin av døgum. Bibiana stendur summastaðni skrivað Viviana.